# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2023/2024



## SPURDÓMUR: HVÍ VERA FÓLK BUNDIN AV EINUM VIDEOSPÆLIÐ?



Granskarar: Næmingar í 4-6 í Kvívíkar skúla.

# INNGANGUR

Vit hava undrast nógv á hvat tað er sum ger at man blívur bundin til eitt videospæl.

So vit fóru at granska tað. Vit spurdu nógv í skúlanum og leitaðu nógv á internettinum. Vit høvdu eisini interviev við einum sálarfrøðingi, Gitti Klein. Vit funnu útav nógvum og nú hava vit funnið útav hví man blívur bundin av einum videospæli.


Lærari:

Hilda Torkildóttir ht1806f2@skulin.fo

Maria Matras Hammer

Trina Eysturoy

Luttakarar:

Lilja Randarsól Bárðardóttir, Boas Wenningstedt Vang, Dánjal Sigird Frankson í Kálvalíð, Naomi Takale Ludvig, Amanda Santos Davidsen og Fríða Bárðardóttir.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

Hví blíva fólk bundin til eitt videospæl?

1. Hvat er tað elsta videospælið?
2. Hvat er tað mest populera videospælið?
3. Hvat kann enda galið um ein spælur for nógv videospøl?

2. Hví er tað so?

Vit halda at tað hevur okkurt við at hava tað stuttligt.

3. Leggið eina ætlan

Leita á google og spyrja fólk í skúlanum, interview við sálarfrøðing.

4. Savnið upplýsingar

Vit hava googla okkum sindur fram, gjørt spurnarkanningar, gjørt interview. Vit spurdu hví blívur ein persónur bundin til eitt videospæl og hvussu tað kann ávirka tey rundan um, og so spurdu eisini hvussu nógv børn hon far um dagin sum eru bundin.

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Høvðusspurningur hjá okkum er: Hví blíva fólk bundin av einum videospæli?

Vit vildu eisini vita hvat tað eldsta og mest populera videospæli er og eisini hvat hevði kunna enda galið um man spældið for nógv videospøl.

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Okkara hypotesur eru at fólk hava tað stuttligt við at spæla og dáma væl følilsið av at vinna so tey blíva við at spæla intil tey vinna.

Vit halda at tetris ella snake er tað eldsta videospælið og at Fortnite er tað mest populera tí tað eru ræðuliga nógv sum spæla Fortnite.

Tað sum vit halda kann enda galið er at fólk blíva bundin og teirra veruleiki blívur til eitt spæl.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Vit ætla savna okkum vitan við at googla, spyrja serfrøðing og gera eina spurnarkanning til namingar, lærarar og arbeiðsfólk í Kvívíkar skúla.

**Spurnarkanning við lærarar og skúlanæmingar í 4-7 flokk:**

1. Hvat er tað besta videospælið?

**Spurnarkanning við lærarar og skúlanæmingar frá 1-7 flokk.**

2. Er nakað broytt síðan tú ella onkur tú kennur er byrjaður at spæla videospøl.
3. Hvussu nógvar tímar spælur tú um dagin.

**Serfrøðingur, samrøða við Gitte Klein, Sálarføðing**

**Leita okkum vitan á alnótini.**

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

Vit hava gjørt eina kanning um hvat tey í kvívíkar skúla halda er tað besta videospælið. Vit hava eisini gjørt eina kanning og spurt tey í skúlanum um tey sjálvi ella onkur annar tey kenna hevur broytt seg tí tey eru byrja at spæla videospøl.

Vit hava brúkt google og copilot til at savnað upplýsingar um videospøl.

Vit hava eisini intervieva Gitte Klein, sum er sálarføðingur.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit hava funnið fram til at fólk blíva bundin av einum videospælið líka, sum fólk blíva bundin av stoffum. Tá ið fólk spæla videospøl sleppur eydnuhormonini leys og tað ger, at tey vera glað og tíma at spæla og klára ikki at steðga. Tey dáma føliIsið av at vinna og at fáa eydnuhormon og so klára tey ikki at sleppa frá at vinna so tey blíva við at spæla intil tey vinna og so blíva tey bundin tí tey vilja blíva við at vinna. Tá ið tey spæla videospøl sleppa tey vekk frá veruleikanum og tað dáma tey, so tey vilja ikki gevast.

Onkur spæla spøl har tey skulu gera uppgávur fyri at koma víðari. Tá blíva tey við at spæla og loysa uppgávur tí tey vilja vera best og koma longri víðari.

Onkur hava sosiala ræðslu (social anxiety) og eru bangin fyri at tosa við fólk. Tá ið tey spæla á online video spølum tá kunnu tey tosa saman uttan at síggja hvønn annan og tað kann gera at tey føla seg tryggan at tosa við ein persón online. Tað kann gera at tey vilja allatíð spæla saman við teimum og so blíva tey bundin at spæla saman við fólki sum tey ikki kenna.

Vit hava eisini kanna og funnið útav at um ein persónur blívur for bundin til eitt spæl so kann heilin hjá honum/henni gott blíva bara til spæl, tí tað er tað einasta tey hugsa um. Tað kann blíva farligt um tað einasta tey hugsa um er eitt spæl har man drepur fólk.

Tað er hent einaferð í Føroyum at ein drongur hevði spælt for nógv Fortnite. Hann hevði funnið eina byrsu og hann hevði skotið sín vinmann. Tá ið foreldrini og politiði spurdu hví hann hevði gjørt eitt sorit ræðuligt ting, tá segði hann bara "eg helt at hann fór at respawna". Í Fortnite er tað at um man doyr so blívur man livandi aftur tað eitur á enskum respawna. Í einum ørum landi hevði ein 14 ára gamal drongur skotið 45 ára gomlu mammu sína tí hann hevði funnið pistólin hjá henni. Mamman hevði einki gjørt drongurin hevði bara tapt í einum spæli og bleiv so illur at hann drap mammu sína.

Boy, 14, addicted to gaming shoots family believing real life was part of game - World News - Mirror Online

Vit hava eisini funnið útav at tey sum ganga í 4-7 flokki í Kvívíkar skúla, halda at Fortnite er tað besta videospælið og tað halda tey flestu kringt jørðina eisini. Fortnite hevur veri tað mest populera spælið síðan 2017 tá ið tað kom út. Meðan Fortnite er tað mest populera spælið er Minecraft tað sum er mest selt.

Tey eldstu spølini vit hava funni eru frá 1950-1980 vit hava funnið fýra ordiliga gomul videospøl. Tey eru Tennis for two (1958), Pong (1972), Space invaders (1978) og Pac-Man (1980). Tennis for two er tað eldsta video spæli sum Willian Higinbottom gjørdi í 1958. Tað er eitt spæl har man spælur tvey saman, men tað er ein kontollari sum bæði spæla á. Tey skulu bara trýrsta á ein knapp og so ferð bólturin yvur um netti og soleðis blívur tað við og man spælur líka sum vanligt tennis og tennis reglar men man skal bara trýrsta á ein knapp.

Eitt videospæl er eitt elektronist spæl sum tú skalt hava eitt joystick, controllara, keyboard ella eitt motion sensing device.

Vit hava tosa við Gitte Klein og vit hava fingið at vita at har eru algoritmir í videospølum og tey eru gjørd til at fanga áhugan á børnum til spæli og til at fáa meira pengar. Tað kann gera at børnini droppa onnur áhugamál og missa samband við vinir og familju.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit hava gjørt ein stutt film um hvat vit hava gjørt og fara vísa teimum í skúlanum.

# FYLGISKJØL


1. Boy, 14, addicted to gaming shoots family believing real life was part of game - World News - Mirror Online

2. Copilot med GPT-4 (bing.com)

3. https://www.grit.fo/

4. Framsíða (kvivikarskuli.fo)

5. 1714647674.mp4